# Bjargingarringarnir flóta

**Eftir at ivi varð sáddur um, hvussu trygg bjargingarbeltini umborð á Smyrli eru, hevur Strandferðslan kanna tey í samráð við Norsk Veritas**

TRYGD

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Úrslitið er, at bjargingarbeltini lúka allar tær treytir, sum teir skulu lúka, sigur Conrad Gaard Joensen, rakstrarleiðari á Strandferðsluni.

Tað var fyrr í vikuni at Sosialinum kundi fortelja, at sviar høvdu ávarað um, at brek var við tí slagnum av bjargingarbeltum, sum vóru umborð á Smyrli.

Trupulleikin við teimum er, at teir kunnu søkka, tá ið teir verða tveittir á sjógv.

- Vit settu okkum beinanvegin í sambandi við Norsk Veritas og í samráð við teir er hvørt einasta belti nú kannað, sigur rakstrarleiðarin.

Umframt beltini umborð á Smyrli, var eisini talan um nøkur fá belti umborð á Teistanum.

Kanningarnar vóru gjørdar á tann hátt, at lodd við ávísari tyngd varð fest í teir og so vórðu teir sleptir á sjógv.

- Kanningarnar vístu, at hvørt einasta bjargingarbelti á Smyrli og Teistanum er fult forsvarligt og lýkur øll krøv, sigur Conrad Gaard Joensen.

Hann sigur, at eftir tí, hann hevur fingið uppspurt, er tað framleiðslan av hesum slagnum av bjargingarbeltum í einum heilt ávísum tíðarskeiði, sum tað hevur verið galið við. Men beltini umborð á Smyrli og Teistanum eru ikki umfatað av hesi framleiðsluni og eru fullkomiliga trygg at brúka.


Sosialurin
Nr. 6 • Mánadagur • 11. januar 2010 • 84. árg. • Kr. 20,00
Ársins songrødd í X-Factor
Síða 4
Vil banna ungum at taka sól
Síða 9
Eidesgaard stuðlar TAKS
Síða 13
Kollfirðingar í finalustríðið
Ítr 13-26
FØLSK TRYGD
Bjargingarringarnir umborð á Smyrli eru av einum merki, sum sviar hava funnið fram til eru í stórum vanda fyri at søkka, tá teir skulu brúkast. - Tað kann væl vera, at onkur ikki er í lagi, tí kanska kanna vit teir ikki nóg væl, sigur John Mikkelsen, skipaeftirlitsmaður
Síða 4
RINGIÐ 312 000
KETILIN
JÄSPI-ketilin er kendur í Føroyum. Við mest seldum ketlum á føroyska marknaðinum nýtist ikki at siga meira...
JÄSPI-ketilin fáa tygum hjá Mariu Poulsen.
JÄSPI Maria Poulsen
Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo | www.mp.fo
TOYOTA www.reyniservice.fo
Today Tomorrow Toyota
Kom og royn tann nýggja Urban Cruiser
Prísir úr 205.850,-
REYNI SERVICE P/F
Vegurin Langi · Hoyvík · Tel 353040
Við Borðoyavík · Klaksvík · Tel 473040
Teldupostur: rs@reyniservice.fo
Á Høgabóli · 600 Saltangará · Tel 44 76 04
N. Finsensg. 18 · 100 Tórshavn · Tel 36 30 00
Ger tað nemt at halda nýggjársliftið við bamix
Thomas Dam búnýti
Lene Hansson

*Mánadagin í seinastu viku kundi Sosialurin upplýsa, at merkið av bjargingarringum umborð á Smyrli er avdúkað at kunna søkka. Stranfaraskip Landsins hava nú kannað ringarnar og allir flóta, sum teir skulu*


# ÁRSINS LEIÐARADAGUR 2010

## Fokus á strategi, effektivisering & innovatión

**29. JANUAR Á HOTEL FØROYUM**





**Slepp eftirlitinum og skapa vinnarar**

**v/Teddy Jeppesen**
Leiðari fyri Autisme Center Vestsjælland - Besta almenna arbeiðspláss í Danmark 2005-09, Besta almenna arbeiðspláss í Evropa 2009

**Innovatiónsleiðsla**

**v/Finn Kollerup**
Stjóri í Alt4Kreativ, Kemiverkfrøðingur, Ph.D. í bioteknologi, MBA í innovatión, fyrrv. deildarleiðari og granskari Novozymes

**AI - Appreciative Inquiry**

**v/Majbritt Højggard**
Organisatións- og leiðsluráðgevi hjá Rambøll, Cand.Psych, MBA International, fyrrv. universitetslektor á University of Swansea i Wales

SPENNANDI & AKTUELL SKRÁ

FYRRAPART
- Dagurin verður settur v/Hjalta í Jákupsstovu, Ársins Leiðari 2009 - Alment
- Úr skjáttuni hjá Ársins virki v/Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost & Ársins Leiðari 2009 - Privat
- Effektivitetur og arbeiðsgleði - Tvær síður av somu søk v/Teddy Jeppesen
- Hvat Er í Lille Skensved? v/Beintu Unni Marr Poulsen
- Brandingcase: Vodafone v/Bjarna A. Bjarnasson
- Verkstovur fyrrapart
  - Slepp eftirlitinum
  - Marknaðaranalysur
  - Innovatiónsleiðsla

SEINNAPART
- Verkstovur seinnapart
  - Idéku
  - AI - Appreciative Inquiry
  - Tíðarrænarar
- Útdeligering v/Heðin Mortensen
- Føroyskir tankar 2010 & kjak
- SCRUM v/Maibritt Højgaard
- Vit kjósa Ársins Leiðarar 2010
- Netverksdrykkur
- Festligt Afterparty

Tilmelding og les alt um dagin á www.synergi.fo ella ring 322355

Synergi